

## Íslendski trolaraflotin minkar

Tá fiskiárið í Íslandi byrjaði 1. september, vóru munandi færri stórir og miðalstórir trolarar, enn fyri einum ári síðani. Íslendski fiskiflotin telur nú 709 skip við veiðiloyvi, tað eru 58 skip færri enn somu tíð í fjør. Umleið helvtin av flotanum eru langfaraskip, meðan restin fiskar í íslendskum sjóøki. Herumframt er eisini eitt stórt tal av smærri bátum, sum ikki eru taldir við her, skrivar heimasíðan hjá Vinnuhúsinum. Orsøkin til fallið í skipatalinum, er stóri niðurskurðurin í toskakvotunum, sum fyri einum ári síðani minkaðu við umleið 60.000 tonsum. Hetta hevur ført til samanleggingar og noytt summi feløg at minkað teirra kostnaðir við at leggja ella selja skip, ið ikki bera seg. Hækkandi fiskaprísir á marknaðunum í Bretlandi og á evropeiska meginlandinum hava vigað nakað upp í móti tyngri kostnaðum, men raksturin hjá íslendska veiðiflotanum er tó framvegis sera tungur, og tí hevur íslendska reiðarafelagið (LIU) funnist at kappingaravlagandi oljustuðlinum, ið varð latin ES-flotanum fyri nøkrum vikum síðani. Í verandi fiskiári, ið gongur frá 1. september 2008 til 31. august 2009, er íslendska toskakvotan 252.634 tons, samanborið við 301.307 tons í seinasta fiskiári.

# Neytini koma í kvøld

**Seinnapartin leygardagin var høvið hjá almenninginum at vitja nýggja fjósið í Havnardali. Hetta er eitt fjós, sum fýra bøndur hava tikið stig til við íognarfelagnum »Sandá«**

LANDBÚNAÐUR

*Orð&mynd: Snorri Brend*

Fjósið er 2000 fermetrar til støddar og hevur pláss fyri 180 neytum, og er útgjørt so mikið væl og djóravinarligt, at tað má teljast millum tey allar fremstu fjósini í Norðurlondum.

Innanveggja er alt gjørt fyri at umstøðurnar hjá neytunum verða so líkar náttúruni sum gjørligt. Ein partur av hesum er at lata neytini ganga á gummimáttum og at hava liggibásar við bleytum undirlagi, eins og bøurin uttanfyri.

Neytini standa enn í ymiskum fjósum, men í kvøld verða tey flutt til tær nýggju og sera modernaðu umstøðurnar í Havnardali. Og í morgin byrjar so framleiðslan av mjólk.

**Í einum komandi blaði verður greitt nærri frá fjósinum og teim møguleikum tað fer at geva fyri føroyskan landbúnað.**



*Teir fýra bøndurnir, sum eru felags um stóra og modernaða fjósið í Havnadali – vinstrumegin Tórfinnur Dalsgarð, Jóhan Petur Brekkstein, Páll Djóni á Steinum og Poul Müller*

# Orð móti orði

**Fríggjadagin fellur dómur í fyrsta rættarmálinum um ídnaðarnjósning í Føroyum. Báðir teir ákærdu nokta seg sekar**

PROSEDURA

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Føroya Rættur:** Hósdagin og fríggjadagin í farnu viku viðgjørdi rætturin eitt mál um vinnustuldur.

Sambært ákæruritinum, hevur ein fyrrverandi stjóri í lýsingarfyritøkuni Team 85 ætlað at fingið fatur á fílum og mappum við sera týðandi upplýsingum haðani.

Hetta skuldi verða gjørt umvegis ein eksternan harðdisk, sum eitt av starvsfólkunum – ein 17 ára gamal maður – sum arbeiddi í fyritøkuni skuldi seta til servara teirra. Gerðin varð avdúkað, og báðir menninir nú skuldsettir fyri vinnustuldur.

Fyrrverandi stjórin vísti á, at hann hevði keypt henda harðdiskin, men hann hevði ongatíð ætlað at stjala upplýsingar frá Team 85. Hann hevði hinvegin biðið unga mannin um at kopiera filmar fyri seg heima við hús, og altso ikki virðismiklar fílur og mappur frá fyritøkuni.

Eftir drúgvu avhoyringarnar var proseduran fyrrapartin fríggjadagin, og tá hon var liðug boðaði dómarin frá, at dómurin í málinum verður feldur komandi fríggjadag.




*Nú skal avgerast um Team 85 varð útsett fyri ídnaðarnjósning í mai mánaði 2006*

*modellmynd*

### »Uberettiget adgang«

Ákærin vísti í síni proseduru millum annað á, at eingin ivi var um, at fyrrverandi stjórin hevði ætlað sær atgongd til upplýsingarnar frá fyritøkuni, - ella »uberettiget adgang« til hesar, sum tað eitur á rættarmáli.

Til tess at fáa fatur á hesum upplýsingum, hevði hann brúkt tann 17 ára gamla mannin sum eitt »viljugt redskab« at seta harðdiskin til servaran á fyritøkuni, soleiðis at hesin kundi kopiera hesar virðismiklu upplýsingarnar um framleiðslur, kundar og ætlanir hjá fyritøkuni.

Hann vísti á, at endamálið og motivið var at gera tað lættari hjá fyrrverandi stjóranum at kunna byrja nýtt virksemi aftur innan hesa vinnugreinina. Men, sum greitt varð frá í blaðnum fríggjadagin, varð ætlanin avdúkað og maðurin ákærdur fyri ídnaðarnjósning.

- Fyrrverandi stjórin var greiður yvir, hvar upplýsingarnir lógu, men tá hann ikki longur hevði nakað við fyritøkuna at gera, má hetta roknast sum »uberettiget adgang«, segði ákærin.

Hann vísti til tvær greinar í donsku revsilógini, har spurningurin um revsingina fyri vinnustuldur verður umrøddur.

Hvørja grein, ið dómur skal fellast eftir, verður upp til dómarin at avgera hesar komandi dagarnar, men hann kann fáa upp í seks mánaðar treytaða fongsulsrevsing. Ákærin metti eisini, at tann ungi maðurin skuldi fáa linastu revsing – tað er: treytaðan dóm uttan nakra ávísa revsing.

### Eingin gangstari

Danski verjin hjá fyrrverandi stjóranum vísti í sínum innleggi hinvegin á, at her vóru ikki nóg góð prógv fyri teim skuldsetingum, sum ákærin hevði ført fram. Í øllum førum var hetta ikki nóg mikið til at fáa hann dømdan fyri vinnustuldur.

At fyrrverandi stjórin skuldi havt áhuga í hesum upplýsingum bygdi, eftir hansara meting uppá gitingar og uttan haldgóð prógv. Hann vísti á, at fyrrverandi stjórin, tá stuldurin fór fram, var í ferð við at fyrireika seg til eina útbúgving sum flogskipari. Tí var einki sum bendi á, at hann yvirhøvur hevði nakran áhuga í at fáa hendur á fílunum og mappunum hjá Team 85.

Av øðrum týðandi viðurskiftum í verjuni av tí ákærda varð víst á, at upplýsingar um ætlanina við vinnustuldrinum vóru bert komnir frá fólki við tilknýti til fyritøkuna. Dentur varð lagdur á, at ein slík hugsan, at ogna sær upplýsingar frá fyrrverandi arbeiðsplássi sínum, lá rættiliga langt burtur frá natúru hansara.

Hann kravdi tí frídøming fyri fyrrverandi stjóran, og tað gjørdi verjin hjá unga manninum eisini, tí, sum hann vísti á: - Ákæran er bæði ógreið, tvítýdd og óviss.

Tann tá 17 ára gamli maðurin hevði ikki hugsað um avleiðingarnar av gerð síni, og var heldur ikki vitandi um at tað var galið. Hann var eingin »hårdhudet gangster«, og tí var rættast at ákæran fall burtur, eins og núverandi stjórin í fyritøkuni hevði ynskt.

Verjarnir hjá fyrrverandi stjóranum og unga manninum kravdu frídøming. Og báðir teir ákærdu nokta seg eisini sekar í ákæruni.